# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Amerikanska hjálandatíðin er farin. Teir, sum koma aftaná, mugu læra at avmarka seg til egin viðurskifti*
*(iranski forsetin)*

# Matti fyrireikaði hópdrápið í seks ár

**Tann 22 ára gamli Matti Juhani Saari tók tíggju ungdómar við sær í deyðan í einari atsókn, sum hann fór undir at leggja til rættis fyri seks árum síðani**



*Ein av myndunum, sum Matti Juhani Saari legði út á alnótina (Mynd: Polfoto)*

Tá Matti Juhani Saari fór inn í handilsskúlan í Kauhajoki við skammbyrsu síni gjáramorgunin , var tað ikki eitt hugskot, sum hann brádliga hevði fingið. Tvørturímóti heldur finska løgreglan, at hann fór undir at fyrireika atsóknina longu fyri seks árum síðani.

Løgreglumaðurin Jari Neulaniemi, sum stendur fyri kanningunum í sambandi við hópdrápið, sigur við svenska blaðið Aftonbladet, at í íbúðini hjá drápsmanninum fann løgreglan eitt skriv og ein pappírslepa, sum benda á, at Matti Juhani Saari var væl fyrireikaður, tá hann fór frá húsum gjáramorgunin.

Tann fyrsta tilkallingartelefonin ringdi á løgreglustøðini klokkan 10.45, og løgreglan bleiv kunnað um skot við handilsskúlan. Ein hálvan tíma frammanundan hevði byrsumaðurin verið á elnótini, har hann hevði skrivað ein stuttan tekst, sum hann kallaði ”Hópdráp í Kauhajoki”. Síðani fór hann á sína drápsferð, sum vardi ein góðan tíma, og sum kostaði honum sjálvum og tíggju øðrum ungdómum lívið.

## Bleiv avhoyrdur

Tann 22 ára gamli Matti hevði verið virkin á alnótini, og ein sjónbandaupptøka við hóttanum fekk mánadagin løgregluna at avhoyra hann. Men sambært Onnu Holmlund, innanríkisráðharra, helt løgreglan seg ikki hava grundarlag fyri at taka byrsuna frá Matti ella at taka vápnaloyvið frá honum. Hetta er fallið mongum finnlendingum fyri bróstið, og alt bendir á, at avgerðin hjá løgregluni skal kannast út í æsir.

Samstundis fer sorgartilburðurin í gjár at elva til, at finnlendingar aftur fara at tosa um ta lagaligu vápnalógina, sum heimilar fólki at eiga vápn, tá tey hava fylt 15 ár. Tann einasta treytin er, at foreldrini góðtaka tað, og at vápnið er undir einum ávísum eftirliti. Vápnalógin bleiv dúgliga umrødd aftan á tilburðin seinasta heyst, tá átta fólk doyðu í einum skúlahópdrápi, og soleiðis verður eisini nú, skriva finsku fjølmiðlarnir.

*Anna Holmlund, innanríkisráðharri, og Matti Vanhanen, forsætisráðharri, hildu tíðindafund beint eftir sorgarleikin (Mynd: Polfoto)*



# Vesturpakistan er ein stór yvirgangshóttan

**Amerikanski verjumálaráðharrin sigur, at tann størsta yvirgangshóttanin ímóti USA kemur úr fjøllunum har vesturi í Pakistan**



*Robert Gates er amerikanskur verjumálaráðharri (Mynd: Polfoto)*

- Vit hava verið hepnir við at steðga al-Qaeda í Irak, og spyr nakar meg, hvar tann størsta hóttanin ímóti USA nú er, so eri eg ikki eina løtu í iva um, at tað er har vesturi í Pakistan, segði Robert Gates, verjumálaráðharri, í einari hoyring í Kongressini í gjár.

Amerikanskir embætismenn hava sagt, at stríðsmenn hjá al-Qaeda og Taleban brúka fjallalendið í Vesturpakistan til støð, haðani teir søkja at málum í Afghanistan, samstundis sum teir royna at undirgrava allan stuðul til USA.

Síðani ta blóðugu atsóknina at Merriott-hotellinum í Islamabad hevur pakistanska stjórnin lovað at seta øll neyðug til tøk í verk fyri at gera enda á yvirganginum í landinum. Samstundis hevur afghanska stjórnin biðið um størri hjálp til at menna landsins hermegi.

Hamid Karzai, forseti, segði í gjár, at landinum tørvar fleiri dollarar, fleiri flogfør, meiri hernaðarútgerð og fleiri vápn til at verja landið og til at berja niður teir, sum forsetin kallaði ”the bad guys”.

**STUTT SAGT**

## Vilja sameining við Jordan

Felagsskapurin Hamas hevur mist nógv av sínari undirtøku millum palestinar síðani valið í 2006, tá Hamas vann. Tað sæst í einari nýggjari meiningakanning, sum lærdi háskúlin á Vestara Áarbakka hevur gjørt, og sum ísraelska blaðið Ha'aretz hevur hugt í. Næstan 1.400 palestinar hava tikið lut í kanningini, 860 á Vestara Áarbakka og 500 í Gazageiranum.

Kanningin vísir, at bara 14,4 prosent styðja Hamas, meðan 36 prosent taka undir við Fatah-rørsluni, sum Mahmoud Abbas, forseti, stendur á odda fyri. Merkisvert er, at sambært kanningini styðja næstan 31 prosent hvørki Hamas ella Fatah, og 2,1 prosent siga, at tey stuðla teirri víðgongdu rørsluni Jihad.

Eitt áhugavert við kanningini er, at sambært henni taka 27,6 prosent av teimum palestinsku veljarunum, at tey palestinsku sjálvstýrisøkini eiga at verða løgd saman við grannalandinum Jordan.

## Bush helt seinastu røðu í ST

Amerikanski forsetin, George W. Bush, helt í gjárkvøldi sína seinastu røðu á ST-aðalfundinum sum amerikanskur forseti, og ikki óvæntað brúkti hann ein stóran part av røðutíðini til altjóða yvirgang.

Bush segði, at Iran og Sýrialand halda fram við at stuðla yvirgangi, og hann mælti altjóða samfelagnum til at seta tiltøk í verk ímóti Iran og Norðurkorea fyri at fáa tey bæði londini at steðga ætlanunum um kjarnorku.

Bush nam eisini við fíggjarkreppuna, sum herjar USA, og hann vissaði londini í ST um, at amerikanska stjórnin fer at taka tey stig, sum eru neyðug fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.